FORSVARSMINISTERIET
PERSONALESTYRELSEN



# Veteranur í Føroyum

Veteransentrið er ein møguleiki hjá hermonnum, veteranum og teirra avvarðandi at fáa stuðul áðrenn, undir og eftir útsending.

**Av Veteransentrinum**

# Stuðul til veteranar og avvarðandi áðrenn, undir og eftir útsending

Upplivir tú avbjóðingar í samband við útsending til eina altjóða missión, bjóðar Veteransentrið stuðul og ráðgeving. Tilboðið er fyri lívið og er bæði til veteranar og teirra avvarðandi.

Fyri at stuðulin kann vera veteranum og avvarðandi, sum búgva í Føroyum, so nær sum møguligt, samstarvar Veteransentrið við Almannaverkið, Borgaratænastuna og við sálarfrøðingar og sjálvboðin í Føroyum.

Veteransentrið arbeiðir út frá tí meginreglu, at hjálp til sjálvhjálp ofta er tann besti stuðulin. Tað vil siga, at tá tú fært tær upplýsingar og metingar, tær tørvar, kanst tú ofta sjálv/ur halda fram og loysa trupulleikarnar.
Vit halda sambandið við teg, til trupulleikarnir eru loystir.

Almannaverkið, Borgaratænastan ella tín sálarfrøðingur kunnu, um tað gagnar viðgerðini av tínum máli kalla inn aðrar persónar frá Veteransentrinum, men altíð bert um tú ynskir tað.

## Tagnarskylda

Vit hava tagnarskyldu. Upplýsingar um tíni persónligu viðurskifti verða ikki bornar víðari uttan títt samtykki



# Sálarlig seinárin

Menn og kvinnur, sum hava verið útsend á altjóða missiónir, hava møtt einum heimi, sum tey, ið ikki hava verið har, kunnu hava trupult við at skilja. Hetta er galdandi bæði fyri tær krevjandi uppgávurnar og tað serliga vinalagið, sum er millum útsendar hermenn, ið hava upplivað sakn, bardaga, tap og krígsins veruleika. Øll verða ávirkað av eini útsending annaðhvørt jaliga ella neiliga.

Nógv tey flestu koma heimaftur við virðismiklum upplivingum og við eini kenslu av at skilja seg sjálvan betur. Men ein partur av teimum, sum hava verið útsend mugu berjast fyri at rista upplivingarnar av sær, og tá fáa nøkur tíverri posttraumatiskt strongdarárin (PTSD), tunglyndi ella onnur sálarlig árin.

PTSD er ein reaktión upp á at hava upplivað hendingar, sum eru nógv ógvisligari enn tær, tú fyrr hevur upplivað. Tí eru veteranar í serligum vanda fyri at fáa PTSD.

Hvussu ofta veteranar fáa PTSD, veldst um slag av missión og hvussu sterkt árinið hevur verið. Danska Verjan kannar alsamt vavið, og ein varlig meting er, at umleið 10 prosent fáa PTSD-sjúkueyðkenni sum avleiðing av at hava verið útsend - tó er er tað sera ójavnt í teimum ymsu missiónunum. Alt eftir hvussu hart ein er raktur kunnu PTSD sjúkueyðkennini vera sera ójøvn. Sjúkan kann í onkrum førum lekjast við viðgerð og í onkrum førum av sær sjálvum.

## Hvat er PTSD?

PTSD er ein stytting av Post Traumatic Stress Disorder sum á føroyskum eitur posttraumatisk strongdarreaktión. PTSD er ein psykiatrisk diagnosa, tvs., at tað er eitt heiti fyri ein bólk av sjúkueyðkennum, sum koma fyri samstundis.

Eitt annað eyðkenni fyri PTSD er, at ein hevur verið fyri ella hevur verið vitni til hendingar, sum hava verið lívshættilsligar ella av sera harðligum slagi.

Velur tú at fara í viðgerð fyri PTSD, er tað umráðandi fyri úrslitið, at tú sjálv/ur fegin vilt hava broyting, og at tú vilt binda teg til viðgerðina. Eisini tá ið viðgerðin krevur nógv av tær.

Jú skjótari tú fært viðgerð, jú skjótari kanst tú byrja at fáa tað betri.

**Viðgerðin í Føroyum**
Venteransentrið bjóðar eina heildarætlan fyri viðger av PTSD í Føroyum. Vendir tú tær til Veteransentrið, vil tú sum oftast verða bjóða/ður eina innleiðandi samrøðu við ein av psykologunum hjá veteransentrinum via MedCom. MedCom er okkara telemedisinska loysn, ið ger tað møguligt at fáa viðger á ymsum eindum, t.d teldum, fartelefon. Eftir innleiðandi samrøðuna verður ein faklig metan gjørd, av hvørjir trupulleikar talan er um, og um trupulleikarnir stava frá altjóða missiónum. Stavar trupulleikarnir frá altjóða missiónum, fer viðgerin ígongd.

Viðgerin kann antin fara fram á MedCom við ein psykolog frá Veteransentrinum, ella hjá einum staðbundnum netverkspsykologi í Føroyum.

Ein diagnosa er ikki nakað sum ein er - eins og eingin heldur er krabbamein ella krím. PTSD er ein støða, ein er í, og sum í flestu førum kann viðgerast.

# Samdøgurstelefonin - títt portur til stuðul alt samdøgrið

Ert tú hermaður, veteranur ella avvarðandi og upplivir tú trupulleika vegna eina altjóða útsending, kanst tú alt samdøgrið, allar ársins dagar - ringja til samdøgurstelefonina hjá Veteransentrinum á +45 7281 9700.

**Í upplatingartíð**

Í vanligari upplatingartíð kanst tú, alt eftir hvat tað snýr seg um, koma í samband við ein av okkara sosialráðgevum, sálarfrøðingum, uppsøkjandi ráðgevum og arbeiðsráðgevum.

Veteransentrið hevur opið mánadag-týsdag kl. 08.00 - 16.00 danska tíð og mikudag-fríggjadag kl. 08.00 - 15.00 danska tíð.

**Uttan fyri upplatingartíð,**

tað vil siga kvøld- og náttartímar, í vikuskiftinum og á halgidøgum svarar ein sosialráðgevi. Sosialráðgevin kann veita beinleiðis stuðul ella útgreina, hvønn tørv tú hevur.

Um tú uttan fyri upplatingartíð hevur brúk fyri øðrum stuðli enn tí, sum sosialráðgevin kann geva tær, vil sosialráðgevin fáa í lag samband við røttu deild í Verjuni áðrenn kl. 09.00 (danska tÌð) næsta arbeiðsdag.

Hevur tú bráðfeingis tørv á stuðli - sama ger nær - vísir Veteransentrið tær til bráðfeingistilbúgvingina.



# Almennaverkið, Borgaratænastan

Borgaratænastan er ein deild undir Viðskiftadeplinum í Almennaverkinum.

Høvuðsuppgávan hjá Borgaratænastuni er at geva borgarunum ráð og leiðbeining um teirra rættindi og skyldur innan sosiallóggávuna, bæði viðvíkjandi búskaparligari hjálp og øllum teimum tænastum og hjálpartiltøkum sum Almannaverkið bjóðar.

Umsóknir um fyribils búskaparliga hjálp eftir forsorgaralógini, einkultveitingar, einkjupensión og aktivering av arbeiðsleysum sum móttaka forsorgarhjálp, er eisini ein partur av uppgávunum sum Borgaratænastan røkir.

**Hvat kann Borgaratænastan gera fyri veteranar og teirra avvarðandi?**

Veteranar og avvarðandi eru altíð vælkomin at venda sær til Borgaratænastuna, um teimum tørvar ráð og leiðbeining innan fyri sosiallóggávuna. Um Almannaverkið ikki veitir ta hjálp, tey leita eftir, so vilja sosialráðgevarnir á Borgartænastuni hjálpa við ráðgeving og leiðbeining um hvar tey so kunnu venda sær fyri at fáa hjálp.

**Tórshavn**

mánadag til hósdag kl. 10.00-15.00
fríggjadag kl. 10.00-13.00

**Klaksvík, Runavík og Tvøroyri**

mánadag til fríggjadag kl. 10.00-12.00

**Ring til Almannaverkið á tlf .: +298 360000**
mánadag til hósdag kl. 10.00-15.00, fríggjadag kl. 10.00 - 13.00
Teldupostur: av@av.fo - Heimasíða: www.av.fo


VALDEMAR LÜTZEN

# Danmarks veteraner - Føroyar

Danmarks Veteraner er eitt felag, sum telur kvinnur og menn, sum uppfylla tey krøv fyri heitið veteranur,  sum stjórnin setur, og sum hava fingið annaðhvørt eina almenna medalju ella tað almenna veterankortið fyri luttøku í eini altjóða operatión.

Eitt av feløgunum í Danmarks Veteraner er felagið Færøerne, sum varð stovnað í 2017 og nú hevur 33 limir, sum búgva í Føroyum.

Tey 19 staðbundnu feløgini eru har "sum lívið verður livað". Feløgini fremja nógv ymisk tiltøk og stuðla bæði veteraninum og hansara familju.

Endamálið við tí føroyska felagnum er at stuðla og stimbra samanhaldið við tiltøkum og við at halda staðbundnar, tjóðar- og altjóða stevnur, fundir, sosial tiltøk og annað virksemi.

**Samband:**

Samband fæst við felagið gjøgnum Facebook í bólkinum:
Føroyskir Veteranar (er ein afturlatin bólkur).



## Føroyskir Veteranar

Tlf.: +298 215333

Teldupostur: faeroeerne@danmarksveteraner.dk

www.danmarksveteraner.dk

Samdøgurstelefonin
hjá Veteransentrinum

# +45 72 81 97 00

---

Samdøgurstelefonin hjá Veteransentrinum er fyri hermenn, veteranar og avvarðandi, sum hava tørv á onkrum at tosa við, sama ger nær.

veterancentret.dk